## Totti aftur á landsliðið

Francesco Totti gavst á italska landsliðnum, eftir at teir seinasta summar vunnu HM-kappingina í fótbólti. Nú sigur spælarin sjálvur, at tað als ikki er víst, at hann hevur spælt sín seinasta landsdyst. Eg fari at tosa við landsliðsvenjaran nú í juli, og so taki eg støðu til, hvussu verður við mínari framtíð á landsliðnum, sigur Totti, sum hetta kappingarárið hevur verið besti málskjúttin í Europa.



## Joey Barton til Newcastle

Núverandi felagið hjá Joey Barton, Manchester City, valdi herfyri at geva spæleranum leikbann, eftir at hann fleiri ferðir var komin upp at táttast við liðfelagar og onnur. Fyri hansara viðkomandi hevur hetta ikki verið nøktandi, og hevur hann tískil valt at fara úr felagnum. Tann eyðkendi harði miðvallarin fer seinni í dag at skriva undir sáttmálan við Newcastle, sum hinvegin sleppur seg av við liðformannin, Scott Parker. Hann fer at royna eydnuna í West Ham.

dømis verða talan um eitt fríspark, eitt mál ella eina rangstøðu sum teir so vísa aftur og aftur úr fleiri vinklum.

Fótbóltur er jú ein ítróttargrein við nógvum nærdystum. Hesir kunnu lættliga gerast í so heitir, og tá er skjótt at leikararnir missa seg burtur eina løtu og so kann eitt slag ella spark koma fyri.

Tað er ikki altíð at dómarin sær hetta, men her er møguleiki hjá upptøkufólkunum at fanga eina tílíka støðu. Aftaná ber so til eitt nú at leikbanna viðkomandi, ið framdi ógerðina út frá tí sum upptøkurnar vísa.

- Talan verður tó ongatíð um at broyta úrslitið av einum dysti!

### Floyt ella ikki-floyt

Í einum landsdysti stendur nógv uppá spæl, og dómari og linjuverjar hava túsund viðurskifti at halda eygu við.

Tað slepst neyvan undan, at teir ikki fáa alt við, og har kann ein góð upptøka vísa, um dómarin floytaði tá hann skuldi ella ikki.

- Hetta hava vit møguleika at vísa aftur fyri teimum, sum sita og hyggja eftir dystinum heima við hús, sigur Peter.

Meginpartin av arbeiðstíð sínari er Peter við slowmotion-tóli sínum í samband við fótbóltsdystir, men gera eisini mong onnur arbeiðir.

- Leygardagin skal eg inn á Idrætsparken í Keypmannahavn, har speedwaygrandprix er á skránni, sigur Peter.

### Ljósið úr erva

Hetta er fyrstu ferð at Peter er í Føroyum í slíkum ørindum. Hann kom higar undan dystinum móti Italia, fór ein lítlan túr aftur til Danmarkar eftir dystin, men var uppá pláss aftur mánakvøldið.

At gera upptøkur á Tórsvølli, niðri í Europa, við ein hondbóltsdyst í eini danskari ítróttarhøll og ein dyst á Svangaskarði er jú hvør sítt.

Men, hvussu er so at gera upptøkur her í Føroyum – krevur tað ikki okkurt heilt serstakt av myndafólkunum?

Júst hetta við sjálvum upptøkunum er ikki beinleiðis arbeiðið hjá Peter. Hetta arbeiðið taka onnur sær av.

Tey eru øll sjálvandi spent eftir, hvussu veðrið er til ein dyst her í Føroyum. Leygarkvøldið var heldur váttligt, men í kvøld verður hinvegin sagt frá sól.

- So tú skilir, at her eru umstøðurnar heilt ymiskar hjá upptøkufólkunum. Tí tað er í roynd og veru ikki annað ljós á stadion enn tað, sum kemur úr erva.

- Tí kann tað verða eitt sindur trupult at fáa alt hetta at hóska saman við upptøkunum. Men heldur veðrið sær allan dagin, fáa vit nakrar ótrúliga vakrar myndir av Svangaskarði, lovar Peter.

### Inzaghi var IKKI rangstaddur

- Vit eru fult greiðir yvir tær umstøðurnar, sum dómarin arbeiðir undir. Og satt at siga, hava vit djúpa virðing fyri teirra arbeiði, tí tað kann ikki altíð vera eins lætt at taka røttu avgerðina, sigur Peter Belmark.

Eftir dystin móti Italia vóru mong á Tórsvølli sum ivaðust í, um Inzaghi var rangstaddur, tá hann skjeyt fyrra málið.

Trupulleikin er mangan hann, at dómarin skal taka eina rætta avgerð í brøkparti av einum sekundi um ein spælari er rangstaddur í somu løtu, sum avleveringin fellur.

Hóast Peter og hansara starvsfelagar hava drúgvar royndir í hesum, kunnu teir viðhvørt sjálvir vera í iva um rætt varð dømt.

Men tá talan er um Italia-dystin er Peter ikki í iva:

- Inzaghi var IKKI rangstaddur. Tað vísa myndirnar í slowmotion púra greitt, sigur Peter.

Hann riggar skíggjan til, og prógvar yvirfyri tíðindafólkunum at rætt er í hesum pástandi:

- Den var go' nok!

# Gott at hugsa um okkurt annað enn fótbólt




**- Tað er fínt at kunna sleppa burtur frá fótbóltinum viðhvørt, ja - at kunna hugsa um okkurt heilt annað enn tað, sigur landsliðsleikarin, Rógvi Jacobsen. Seinnapartin í gjár var hann saman við hinum í hópinum á busstúri í Vágum.**



*- Eg havi ikki áður verið her í Gásadali. Her er sera vakurt, sigur Rógvi Jacobsen*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

LANDSDYSTUR
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Gásadalur:** - Nú hava vit fokuserað uppá fótbólt í eina heila viku. Tá er ótrúliga gott at kunna slappa av við nøkrum heilt øðrum her í Gásadali, sigur málskjúttin, Rógvi Jacobsen.

Hann hevur fingið nógv umrøðu eftir søguliga málið ímóti Italia á Tórsvølli leygardagin. Og nógv hevur verið tosað við hann.

Hjá honum og hinum er gott at fáa møguleika at hugsa um okkurt heilt annað. Tí varð skipað fyri soleiðis at fyri, at allur landsliðshópurin vitjaði vestastu bygdirnar á Vágoynni seinnapartin í gjár.

- Tað er doyligt at koma higar til Gásadals. Eg havi so ongatíð verið her áður, og tað hava fleiri av hinum leikarunum heldur ikki, sigur Rógvi Jacobsen við Sosialin.

### Náttúra og pannukøkur

Hetta hevur verið ein strævin vika hjá føroysku landsliðsleikarunum.

Undan dystinum móti italska landsliðnum høvdu teir verið saman fleiri dagar frammanundan. Eftir henda dystin fingu teir ein lítlan steðg, nú teir skulu aftur í eldin í kvøld ímóti Skotlandi.

Dysturin móti Italia var leygarkvøldið og eftir hann høvdu teir helst nógv at práta um saman. Sunnumorgunin høvdu teir eina lætta venjing, men fingu síðani ein frídag.

Á middegi mánadagin hittust teir aftur, og í gjár varð skipað fyri eini útferð vestur í Vágarnar, har tvey støð skuldu vitjast: Gásadalur og Bøur. Í fyrra staðnum var sightseeing á skránni, og í tí seinni stóðu pannukøkur og annað gott fyri teimum í Pakkhúsinum.

- Jú, tað er deiligt at fáa møguleika at koma út í føroysku náttúruna og hugsa um okkurt heilt annað enn fótbólt, sigur Rógvi við Sosialin.

### Ein dyst ísenn

Hjá einum fótbóltsspælara á landsliðsstøði eru avrikini á vøllinum sjálvandi tey, sum telja mest.

Ein annar eins neyðugur eginleiki hjá honum er at duga at kobla frá og bert taka ein dyst ísenn. Hetta var eisini endamálið við útferðini til Gásadals seinnapartin í gjár.

- Tá ein hevur spælt ein so týdningarmiklan og krevjandi dyst ímóti Italia, er ikki lætta at fáa hann úr høvdinum beinanvegin. Ein hugsar alla tíðina um tað, sum ein gjørdi gott og tað ein kundi gjørt betri.

- Tað gekk tí alt leygarkvøldið og ein stórur partur av sunnudegnum, áðrenn hann var sodnaður heilt. Tá var tíð at byrja um hugsa um dystin ímóti Skotlandi, sigur Rógvi.

> ” *Tað er umráðandi fyri okkum, at vit ikki framhaldandi liva í dystinum leygardagin. Hugsa vit ov nógv um hann, so kann tað lætt enda galið í kvøld*

Júst til dystin í kvøld leggur hann stóran dent á, at teir 11 á vøllinum mugu fáa armarnar niður og minnast til, at her er talan um ein heilt annan dyst.

- Tað er umráðandi fyri okkum, at vit ikki framhaldandi liva í dystinum leygardagin. Hugsa vit ov nógv um hann, so kann tað lætt enda galið í kvøld. Vit mugu verða 100 % klárir, slær álopsleikarin fast.

### Fit for fight

Alt verður gjørt fyri at teir í landsliðshópinum skulu hava tær bestu umstøðurnar at fyrireika seg til Skotlandsdystin.

Í gjáramorgunin vandu teir eina løtu. Síðani var massasja á skránni og hvíld, áðrenn teir seinnapartin løgdu út á ferðina vestur í Vágar.

Við kønum ferðaleiðara fingu teir mangt nýtt at vita um Gásadal og umstøðurnar hjá bygdarfólkunum gjøgnum tíðirnar.

Gott var hjá leikarunum at fáa okkurt annað at hugsa um enn fótbólt. Men hetta tekur kortini ikki hugin frá Rógva og hinum til dystin í kvøld.

- Allir mans eru »fit for fight«. Eingin hevur skaða, so tí gleða vit okkum til dystin, sigur Rógvi Jacobsen.



*Teir fingu mangt gott at vita frá lokalt kenda ferðaleiðaranum*